Sjálvsognarstovnurin ALV

# Søkt verður eftir skúlaleiðara til skúlan við Áir

**Arbeiðsuppgávurnar hjá skúlaleiðaranum:**
- At vera við til at endurskoða og skipa virksemið á skúlanum, samsvarandi viðtøkunum fyri stovnin.
- At hava ábyrgdina av dagligu leiðsluni og virkseminum á skúlanum.
- At luttaka í undirvísingini eftir tørvi.

Í dag fevnir fráléran á skúlanum um 9. fl. fólkaskúlans og ein FHS- flokk.

**Førleikakrøv:**
- Læraraútbúgving.
- Góð leiðslu- og samstarvsevnir.
- Áhuga at arbeiða teimum arbeiðstarnaðu at frama.
- Førleika at útføra og menna ásett arbeiði.

**Vit bjóða:**
- Avbjóðandi uppbyggingararbeiði, har góðir møguleikar eru fyri ávirkan.
- Tætt samstarv við ALV-stýrið.
- Fjøltáttað og sjálvstøðugt arbeiði.
- Skeiðmøguleikar.

**Løn og setanartreytir:**
- Starvið verður at seta 1. oktober 2004 ella skjótast tilber.
- Starvið hevur tilvísing til stýrið.
- Starvið er flokkað í lønarflokki 32.1/32.2, sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Áhugað kunna venda sær til Doris Hansen á tlf. 265266 ella Bartal Kass á tlf. 221310 fyri at fáa fleiri upplýsningar.

**Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 20. september 2004 kl 12:00.**
Umsókn saman við prógvið, royndarváttan v.m.skal sendast til:

**Sjálvsognarstovnin ALV**
Boks 301
110 Tórshavn

**brævbjálvin skal merkjast:**
**»umsókn skúlaleiðari«**

*Endamálið við skúlanum er:*
*c) at skipa fyri endurbúgving og umskúling, so vinnutarnað aftur kunna fara til arbeiðis,*
*d) at skipa fyri fakligari útbúgving handaliga ella bókliga av arbeiðstarnaðum.*
*(Hetta er partur av endamálsorðing fyri ALV)*

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Barnavognar ynskjast til keyps

Dagstovnurin við Landavegin ynskir brúktar barnavognar til keyps. Um tygum hava ein ella fleiri barnavognar til sølu, kunnu tygum seta tygum í samband við Kirstin Djurhuus, stovnsleiðara á 30 23 80 / 27 29 29.

SNARSKIVAN

# Barnaheimið søkir eftir fólki til Familjudeildina

Eitt fast starv á Familjudeildini er leyst til setan frá 1. okt. 2004. Tann sum settur verður í starvið, skal starvast í skiftandi vaktum á Familjuheiminum, har 9 fólk eru í starvi, øll við viðkomandi útbúgving.

Eitt avloysarastarv á Familjudeildini er leyst til setan frá 1. oktober 2004 vegna barnsburðarfarloyvi. Tann sum settur verður í avloysarastarvið, skal eisini starvast í skiftandi vaktum.

Endamálið við arbeiðinum á Familjudeildini er, at foreldrini verða styrkt og stuðlað í tí at vera foreldur, soleiðis at familjan kann virka betur sum ein heild. Eisini er endamálið at fáa greiði á, hvørjar styrkir og hvørjir trupulleikar familjan hevur, og í hesum sambandi meta um, hvat slag av stuðli er best og mest viðkomandi at veita familjuni.

Hevur tú viðkomandi útbúgving, og hug at royna teg í hesum størvum, so send umsókn sum skjótast til

**Føroya Barnaheim**
Pedda við Steinsgøta 10
100 Tórshavn

Løn sambært avvarðandi yrkisfelag.

Er eitt hvørt tú ynskir at frætta nærri um, so ber til at ringja í vanligari arbeiðstíð á tlf. 212320 og spyrja eftir Hallbjørg Lamhauge, deildarleiðara á Familjudeildini ella Beintu Jóhannesen, leiðara.

Umsóknir við prógvum o.ø. skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 17.september 2004.

**Føroya Barnaheim**

# Fuglafjarðar skúli

Eitt tíðaravmarkað lærarastarv fyri lærara í farloyvi er leyst at søkja.

**Tímatalva:**
12 t. fø. í 1.a og 8.b fl.
3 t. heimst. í 1.a fl.
2 t. en. í 5. fl.
4 t. sø/samt. í 8.a og 8.c fl.
4 t. la í 8.a og 8.c fl.

Starvið er tíðaravmarkað frá umleið 20. september og alt skúlaárið 2004/2005.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Mentamálaráðið og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita frá skúlastjóranum á tlf. 444087 ella 214087.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi **mánadagin 13. september kl. 10.00.**

**Leggið við ljósrit av prógvi og møguiligum viðmælum!**

**Fuglafjarðar skúlastýri**
**v/ Una Næs**
**FO-530 Fuglafjørður**

SORINSKRIVARIN Í FØROYUM

# skrivstovufólk

## til Dómaraskrivstovuna

Søkt verður eftir fólki til starv á Dómaraskrivstovuni til setan skjótast gjørligt. Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna.

**Starvið fevnir m.a. um hesar uppgávur:**
- Vanligt skrivstovuarbeiði
- Skráseting á teldu
- Telefonavgreiðslu

**Førleikakrøv:**
- Skrivstovuútbúgving ella líknandi útbúgving
- Góð evni at samskifta á føroyskum og donskum máli
- Teldufórleiki á brúkarastøði
- Góð samstarvsevni
- Kunna arbeiða sjálvstøðugt

**Setanartreytir:**
Løn- og setanartreytir eru sambært felagssáttmála millum Statsansattes kartel og Finansministeriet og sáttmála millum HK/STAT og Finansministeriet. Setanarøkið fevnir um allar deildir á Dómaraskrivstovuni.

Nærri fæst at vit um starvið við at ringja til Kathrinu Magnussen, skrivstovuleiðara, tlf. 311003.

**Umsóknir:**
Umsóknir, prógv og møgulig viðmæli skulu vera Dómaraskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 15. september 2004.

**Sorinskrivarin í Føroyum**
tann 30. august 2004

Henrik Møller
adm. sorinskrivari

# Hvør vil eiga meg?



Eg eri 11 vikur gamal.
Eg eri sera reinligur
Eg leiti eftir hundavinarligari familju, sum vil lova mær at búgva hjá sær, tí nú er vorðið ov trongt at búgva saman við mammu míni.

**Vinarliga ring tlf. 443109 ella 212255**



Sjálvsognarstovnurin ALV

# ALV søkir eftir einum skrivstovufólki fulla tíð

Arbeiðsuppgávurnar verða í høvuðsheitum at hava um hendi stovnsins skrivstovuarbeiði.

**Førleikakrøv**
- Viðkomandi útbúgving og skrivstovuroyndir
- Duga at arbeiða fjølbroytt og sjálvstøðugt
- Hava góð samstarvsevnir

Bókhaldið verður ført í Lundanum.
Lønir- og fakturar yvir Com-Data skipanina og flytingar yvir heimagreiðslu.

**Vit bjóða**
- Spennandi avbjóðingar
- Møguleika fyri skiftandi arbeiðstíðum
- Skeið møguleikar

**Løn og setanartreytir**
- Starvið hevur tilvísing til fyristøðufólkið.
- Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið, lønarflokk 3.
- Starvið verður at seta 1. nov. 2004 ella skjótast tilber.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Guðrun Guðjónsson, deildarleiðari, tlf. 350072.

**Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 18. sept. 2004.**

Umsókn saman við prógvi, royndarváttan v.m skal sendast til:

**Sjálvsognarstovnin ALV**
Smiðjugerð 6, kj.
Postboks 301
110 Tórshavn

**Viðmerk á brævbjálvan:**
**»umsókn skrivstovufólk«**

# GER KVETTI

## Opel Astra 1600 bíliga til sølu



**Árg 97 · km. 85.000**

**Bilurin er í sera góðum standi og sera økonomiskur í brúki.**

**Til sølu vegna flyting**

**Áhugaði vinarliga ringi á tel 25 28 25 ella maila á gudny78@msn.com**

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktarfrøðingar til A3

Á A3 eru tvey avloysarastørv á starvsbrøki 1,0 sum sjúkrarøktarfrøðingur í blandaðum vaktum leys at søkja til setan skjótast gjørligt fram til 31. desember 2004.

Deildin er ein kirurgisk 5-dagadeild, ætlað sjúklingum innlagdir til styttri kanningar/viðgerðir. Vit hýsa sjúklingum við almenn kirurgiskum, gynækologiskum, urologiskum, ortopædiskum, eygna-, oyrna-, nøs- og hálsasjúkum. Deildin hevur 20 seingjarpláss og er í tøttum samstarvi við ta støðugu seingjardeildina.

**Førleikakrøv:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakliga vitan og roynd innan kirurgiskari sjúkrarøkt
- góð samstarvsevni
- opin og positiv/ur

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Upplýsingar um starvið:**
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Nainu Helmsdal, deildarleiðara á telefon 30 45 00, lokal 5003 ella til Ceciliu Vestureið, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing á telefon 30 45 00 lokal 5102 ella e-post ceci@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 17. september 2004 kl. 12.00.

Skrivlig umsókn, merkt »umsókn til starv« við avriti av prógvum, CV og viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um starv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«*

# Søkt verður eftir fólki

til fyrifallandi arbeiði í kommununi.

Umsóknir skulu vera kommununi í hendi í seinasta lagi 15. sept. 2004.

Skikkaður umsøkjari er til starvið.

**Sjóvar kommuna**
490 Strendur

# TILBOÐ

GALDANDI TIL 11. SEPTEMBER



**GOSBAÐ**
- Mát: 135 x 135cm, 294 ltr
- Við 8 jetdysum

BERT 8.598,-
spar 2.400,-

**SPEGLGLAS-SKJÓTIHURÐAR**
- Breidd 120 cm. samlað
- Hædd 226 cm.



NÚ 1.198,-
spar 800,-



**Laminatgólv**
- Easy snap system
- Ahorn ella bók

BERT 68,- pr. m²

**BEKO 20 T58**
- 20" sjónvarp
- v/tekstvarpi og fjarstýring



BERT 1.998,-



**INDESIT G74 turkitrumla**
- Tekur 5 kg
- Mekanisk stýring

BERT 1.998,-
spar 700,-

damor
KVÍGGJARTÚN 3 • ARGIR • TEL 315415 • FAX 319001

# Motorsúkkluskeið

byrjar mánadagin tann 6. september kl. 19.00.

**Tvøroyrar Teori- og koyriskúli**
tlf. 371180/221463